# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 31.10.2016*

**Bygdaráðsfundur: 31.10.2016 kl. 17.00 til kl. 19.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 106/2016 Alment virksemið yvirhøvur**

J.nr. 00.32.10-S08-2-16

**Málslýsing**

Fíggjarætlan 2017 – onnur viðgerð

Fyrsta viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2017 var á bygdaráðsfundi 26.09.2016.

Fíggjarnevndin mælir til, at høvuðstølini til aðru viðgerð av fíggjarætlannini fyri 2017, hjá Nes kommunu, eftir broytingar, verða hesi

| **Rakstur tkr.** | **2017** | **2016** | **Munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristing | 4.296 | 4.341 | -45 | -1,0 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 15.370 | 15.077 | 293 | 1,9 |
| §3 Børn og ung | 10.479 | 10.728 | -249 | -2,3 |
| §4 Undirvísing | 3.582 | 3.564 | 18 | 0,5 |
| §5 Mentan og frítíð | 3.411 | 3.065 | 346 | 11,3 |
| §6 Teknisk mál | 3.936 | 3.972 | -36 | -0,9 |
| §7 Kommunalt øki | 2.682 | 2.623 | 59 | 2,3 |
| **Rakstur í alt** | **43.756** | **43.370** | **386** | **0,9** |
| | | | | |
| **§20 Inntøkur v.m.** | **46.904** | **44.484** | **2.420** | **5,4** |
| | | | | |
| **Úrslit áðrenn íløgur** | **3.148** | **1.114** | **2.034** | **182,6** |
| | | | | |
| **Íløgur tkr.** | | | | |
| §2 Almanna- og heilsumál | 210 | 320 | -110 | |
| §3 Børn og ung | 0 | 2.657 | -2.657 | |
| §4 Undirvísing | 600 | 0 | 600 | |
| §5 Mentan og frítíð | 148 | 500 | -352 | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| §6 Teknisk mál | 1.590 | 2.592 | -1.002 | |
| §7 Kommunal virki | 600 | 597 | 3 | |
| **Íløgur í alt** | **3.148** | **6.666** | **-3.518** | **-52,8** |
| **Úrslit aftaná íløgur** | **0** | **-5.552** | **5.552** | **100,0** |
| **Afturgjald av skuld** | **2.660** | **2.456** | **204** | **8,3** |
| **Av tøkum peningi** | **2.660** | **5.008** | **-2.348** | **-46,9** |
| **Lántøka** | **0** | **3.000** | **-3.000** | **-100,0** |

Fíggjarnevndin mælir til at, skattaprosentið er óbroytt 20,5 % og, at barnafrádrátturin er óbroyttur, kr. 5.000.

Fíggjarnevndin mælir til, at afturgjald av skuld verður fíggjað við tøkum peningi.

**Tilmæli**
Á fundi 25.10.2016 mælir Fíggjarnevndin til, at skattaprosentið verður óbroytt 20,5 %, og at barnafrádrátturin verður óbroyttur kr. 5.000.

Á fundi 25.10.2016 mælir Fíggjarnevndin til, at afturgjald av skuld verður fíggjað við tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 107/2016 Parkir, frítíðar/ítróttarannlegg og lendisrøkt v.m.**
J.nr.04.03.00-P20-2-16
**Málslýsing**
Spælipláss og úti fitness á Svangaskarið – onnur viðgerð

Á bygdarásfundi 26.09.2016 var samtykt, at taka av tí lægsta tilboðnum uppá spælipláss og útifitness á Svangaskarði. Lægsta tilboðið átti Innspark, sum er uppá kr. 360.251, uttan trampolinir. Við trampolinum er kostnaðurin kr. 412.028, íroknað 6,25 % í MVG. Kommunan skuldi kanna kostnaðin av at gera spælipláss og útifitness á Svangaskarði. Kommunan fekk tilboð frá Blika, Innspark og Vind.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 31.10.2016*

**Tilmæli**
Á fundi 25.10.2016 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av tilboðnum frá Innspark áljóðandi kr. 412.028 íroknað 6,25 % mvg, umframt meirkeyp áljóðandi kr. 46.972 íroknað 6,25% mvg. Peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 108/2016 Tilbúgvingarvirksemið**
J.nr.14.00.00-Ø09-1-16
**Málslýsing**
Fíggjarætlanin fyri 2017, hjá Skálafjarðar Kommunala Sløkkiliði (SKS), er komin til ummælis hjá Nes kommunu. Gjaldið pr. íbúgva er óbroytt í mun til undanfarna ár.

**Tilmæli**
Á fundi 25.10.2016 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við fíggjarætlanini,
hjá Skálafjarðar Sløkkilið, soleiðis sum hon er uppsett.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 109/2016 Alment virksemið yvirhøvur**
J.nr. 00.32.10-S08-9-16
**Málslýsing**
Økistænastan Roðin hevur gjørt uppskot til fíggjarætlan fyri árið 2017 áljóðandi 71.057 tkr., herav 61.719 tkr. skal gjaldast av samstarvinum. Parturin hjá Nes kommunu 11.285 tkr.

**Tilmælir**
Á fundi 20.10.2016 mælir Trivnaðarnevndin til at taka undir við fíggjarætlanini, hjá Økistænastuni Roðanum, soleiðis sum hon er uppsett.

Á fundi 25.10.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 110/2016 Alment virksemið yvirhøvur**
J.nr. 00.32.10-S08-12-15
**Málslýsing**
Eykajáttan til barnaverndartænastuna í 2016 – fyrsta viðgerð.

Í skrivi 17.10.2016 søkir Barnaverndartænastan um eykajáttan til fíggjarárið 2016 áljóðandi 1,1 mió kr., har parturin hjá Nes kommunu er 223.000 kr.

**Tilmælir**
Á fundi 20.10.2016 mælir Trivnaðarnevndin til at játta Barnaverndartænastuni eykajáttan á kr. 223.000.

Á fundi 25.10.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini, og at peningur verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 111/2016 Fólkaupplýsing og frítíðarvirksemið**
J.nr.: 18.15.00-S49-1-16
**Málslýsing**
Í skrivi 17.10.2016 søkir nevndin fyri Ungdómshúsið um fíggjarligan stuðul fyri 2017.

**Tilmælir**
Á fundi 20.10.2016 mælir Trivnaðarnevndin til at játta Ungdómshúsinum ein stuðul áljóðandi kr. 200.000 í 2017, tað sama sum í 2016.

Á fundi 25.10.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 112/2016 Ognir og hølir**
J.nr. 82.07.00-P20-1-16
**Málslýsing**
Uppá fyrispurning hevur Nes kommuna fingið tilboð uppá hurð, á skinnara, millum durin og gongina. Tilboðið er frá Mallco, og er áljóðandi kr. 24.400 uttan mvg.

**Tilmælir**
Á fundi 20.10.2016 mælir Mentanarnevndin til at taka av tilboðnum frá Mallco, áljóðandi kr. 24.400 uttan mvg.

Á fundi 20.10.2016 tekur Tekniska nevnd undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

Á fundi 25.10.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini og Teknisku nevnd, og at peningurin verðun tikin av stovninum fólkaskúlin.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini, Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 31.10.2016*

**Mál nr. 113/2016 Alment virksemi yvirhøvur**
J.nr. 00.32.10-S08-7-16
**Málslýsing**
Í skrivi 25.09.2016 søkir skúlastýrið um kr. 45.000 til tað vanliga skúlastýrisarbeiðið í 2017.

Somuleiðis biða tey um kr. 5.000 til foreldraráðið, sum er eitt ráð fyri øll foreldraumboð í skúlanum.

**Tilmælir**
Á fundi 20.10.2016 mælir Mentanarnevndin til at játta skúlastýrinum kr. 50.000 í 2017.

Á fundi 25.10.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 114/2016 Alment virksemi yvirhøvur**
J.nr.00.32.10-S08-8-16
**Málslýsing**
Námsfrøðiliga ráðið hevur á fundi viðgjørt fíggjarætlan skúlans til komandi fíggjarár, og hevur sent kommununi umsókn um játtan til fíggjarætlanina 2017.

Nes kommuna hevur gjørt eina langtíðarætlan fyri telduøkið, har kr. 70.000 vera jattaðar um árið. Harumframt verður mælt til, at íløgur verða gjørdar í nýggjar uppvørpur.

Skúlastýrið hevur viðmælt fíggjarætlan skúlans fyri 2017, á fundi 29.09.2016.

**Tilmælir**
Á fundi 20.10.2016 mælir Mentanarnevndin til, at játtanin til skúlan/blokkin verður kr. 610.000 í 2017.

At játtanin til kt-útbúnaðin og uppvørpur verður kr. 100.000 í 2017.

Á fundi 25.10.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 115/2016 Alment virksemi yvirhøvur**
J.nr. 00.32.10-S08-8-16
**Málslýsing**
Í skrivið 29.09.2016 er umbøn frá skúlanum um at játta pening til 20 tímar til bókavørðar í 2017. Kostnaður fyri 20 tímar er kr. 4.680.

Skúlastýrið hevur viðmælt umbønina á fundi 29.09.2016.

**Tilmælir**
Á fundi 20.10.2016 mælir Mentanarnevndin til at játta kr. 4.680 til bókavørðar í 2017.

Á fundi 25.10.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum fólkaskúlin.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 116/2016 Alment virksemið yvirhøvur**
J.nr. 00.32.10-S08-6-16
**Málslýsing**
Í skrivi 17.10.2016 søkir Tofta Ítróttarfelag um fíggjarliga stuðul fyri 2017. Søkt verður um stuðul til vaksnamannadeildini áljóðandi kr. 200.000, og til ungdómsdeildini kr. 150.000, sum er sama upphædd sum í 2016.

**Tilmælir**
Á fundi 20.10.2016 mælir Mentanarnevndin til at játta Tofta Ítróttarfelag stuðul til vaksnamannadeildina áljóðandi kr. 200.000, og kr. 150.000 til ungdómsdeildina.

Á fundi 25.10.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 117/2016 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr. 02.34.02-P20-7-16
**Málslýsing**
Í skrivi 21.09.2016 søkja Maja og Jákup Jacobsen um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 474v á Lýðarsvegi.

**Tilmæli**
Á fundi 20.10.2016 mælir Tekniska nevnd til at játta Maju og Jákup Jacobsen byggiloyvi til sethús á matr. nr. 474v, eftir ávísum treytum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 31.10.2016*

**Mál nr. 118/2016 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerðir**

J.nr. 02.34.02-P20-7-15

**Málslýsing**

Í skrivi 30.09.2016 søkja Kristina Andreassen og Jóan Magnus Skoradal um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 342b á Høganesvegi.

**Tilmæli**

Á fundi 20.10.2016 mælir Tekniska nevnd til at játta Kristinu Andreassen og Jóan Magnus Skoradal byggiloyvi til sethús á matr. nr. 342b, eftir ávísum treytum.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 119/2016 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerðir**

J.nr. 02.34.02-P20-23-16

**Málslýsing**

Í skrivi 07.10.2016 søkir Alberg Gaardlykke um byggiloyvi til grillsmáttu, til støddar 9,2 $m^2$, og til hjall til støddar 6 $m^2$, á matr. nr. 699au.

**Tilmæli**

Á fundi 20.10.2016 mælir Tekniska nevnd til at játta Alberg Gaardlykke byggiloyvi til grillsmáttu og hjall.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 120/2016 Vegir og ferðsla**

J.nr.05.13.09-P20-1-16

**Málslýsing**

Í skrivi móttikið 07.10.2016 heita borgarar við Nesveg á kommununa um at seta bilverju upp, frá møtiplássinum úti á Rætt og heim til húsini á Nesvegi 75.

**Tilmælir**

Á fundi 20.10.2016 mælir Tekniska nevnd til, at bilverja verður gjørd frá møtiplássinum úti á Rætt og inn til húsini hjá Irmu Svalbard uml. 150m, mettur kostnaður kr. 120.000.

Á fundi 25.10.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, at arbeiðið verður gjørt í 2016, og at peningurin verður tikin av stovninum vegir/viðlíkahald

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 31.10.2016*

**Mál nr. 121/2016 Veitingarvirksemið el, vatn o.a.**

J.nr. 13.01.00-G01-1-16

**Málslýsing**

Nes kommuna hevur fingið tilboð frá Sp/f Rók-el uppá led amaturir á Brekkuvegnum. Tilboðið er áljóðandi kr. 83.000 uttan mvg.

**Tilmælir**

Á fundi 20.10.2016 mælir Tekniska nevnd til taka av tilboðnum frá Rók-el uppá 20 stk. led amaturir á Brekkuvegnum.

Um peningur ikki er eftir til 20 stk. amaturir so taka tað nøgd av amaturum sum peningur er til.

Á fundi 25.10.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av stovninum gøtuljós.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 122/2016 Vegir og ferðsla**

J.nr. 05.02.00-P20-1-16

**Málslýsing**

Í skrivi 13.10.2016 søkir Marjun Gaardbo um loyvi til at gera veg til matr. nr. 412, og vaksa um túnið niðan- og sunnanfyri sethúsini. Ætlanin er, at vegurin verður sunnanfyri sethúsini við íbinding í vegin við Rætt.

**Tilmælir**

Á fundi 20.10.2016 mælir Tekniska nevnd til at játta Marjun Gaardbo loyvi til veg og vaksa um túnið á matr. nr. 412, eftir ávísum treytum.

Marjun Gaardbo var úti, meðan málið varð viðgjørt.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Marjun Gaardbo var úti, meðan málið varð viðgjørt.

**Kunning:**

**Roknskapur fyri 2016 (9 mðr. ella 3 kv) hjá Nes kommunu**

***(á næstu síðu)***

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 31.10.2016*

| **Rakstur** | **3.kv.** | **fíggjaræltan v/eykajáttan** | **munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristingar | 2.998.108 | 4.341.000 | 1.342.892 | 30,9% |
| §2 Almanna- og heilsumál | 11.392.716 | 15.077.500 | 3.684.784 | 24,4% |
| §3 Børn og ung | 7.781.051 | 10.728.000 | 2.946.949 | 27,5% |
| §4 Undirvísing | 2.693.295 | 3.809.500 | 1.116.205 | 29,3% |
| §5 Mentan og frítíð | 1.588.971 | 2.732.000 | 1.143.029 | 41,8% |
| §6 Teknisk mál | 2.369.499 | 3.972.000 | 1.602.501 | 40,3% |
| §7 Kommunal virki | 2.081.412 | 2.710.500 | 629.088 | 23,2% |
| **Rakstur í alt** | **30.905.052** | **43.370.500** | **12.465.448** | **28,7%** |
| | | | | |
| §20 Inntøkur v.m. | -36.669.027 | -44.484.000 | -7.814.973 | 17,6% |
| | | | | |
| **Rakstur pr. 30.09.2016** | **-5.763.975** | **-1.113.500** | **4.650.475** | **-417,6%** |

| **Íløgur** | **3.kv.** | **fíggjaræltan v/eykajáttan** | **munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §2 Almanna- og heilsumál | 0 | 320.000 | 320.000 | 100,0% |
| §3 Børn og ung | 3.402.319 | 2.656.500 | -745.819 | -28,1% |
| §4 Undirvísing | 17.102 | 0 | -17.102 | 0,0% |
| §5 Mentan og frítíð | 833.578 | 500.000 | -333.578 | -66,7% |
| §6 Teknisk mál | 219.505 | 2.592.375 | 2.372.870 | 91,5% |
| §7 Kommunal virki | 115.204 | 596.745 | 481.541 | 0,0% |
| **Íløgur í alt** | **4.587.708** | **6.665.620** | **2.077.912** | **31,2%** |
| | | | | |
| **Íløgur og rakstur í alt** | **-1.176.267** | **5.552.120** | **6.728.387** | **121,2%** |